# Svartkalvi

**Jákup Sverri, túrur nr. 2224**
**Tíðarskeið: 11/6-15/6 2022**
**Ábyrgd:** Lise H. Ofstad

**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum er at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skulu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum (m.a. longu, brosmu og blálongu), sum verða fingin.*




## Samandráttur


Fyribilsúrslit frá árliga svartkalvatúrinum gav í miðal 105 kg svartkalva per troltíma (Mynd 1). Í miðal fyri árini 1995-2021 vóru fiskaði 115 kg av svartkalva um tíman, so í 2022 var veiðan eitt vet undir miðal. Bert 11 støðir vórðu tiknar og allar støðirnar vóru eystanfyri. Av 2680 longdarmátaðum svartkalvum vóru umleið 70% (1851 fiskar) millum 45 og 55 cm langir (Mynd 3). Magakanningar vístu, at svartkalvi í høvuðsheitum etur svartkjaftur. Nakrar svartkalvanytrur (Mynd 2) vórðu aldurslisnar umborð. Veiðan, tal av nytrum, magar v.m. sæst í Talvu 1.





*Mynd 1. Kg av svartkalva per troltíma. Miðalveiðan fyri árini 1995-2021 sæst sum ein stiplað linja.*



*Mynd 2. Svartkalvanytrur.*



*Mynd 3. Longdarbýti av svartkalva á túri 2224.*

## Um túrin

Av tí at ymiskt arbeiði skuldi gerast umborð á Jákup Sverra áðrenn fráferð, bleiv túrurin einans 3 dagar langur og ikki 6 sum ætlað. Fóru av Havnini kl. 17:30 leygarkvøldið 11. juni. Sigldu í ein landsynning út á 400 metra dýpi og tovaðu okkum norðeftir, kring Fugloyartunguna. Komu á Havnina kl. 6:40 tann 15. juni og landaðu. Veðrið var hampiligt allan túrin.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3) og havtasku (bústig 1-5, egin).

## Reiðskapur

Stjørnutrol við 135 mm meskum í posanum. Rockhopper grunnur (24-24in), Seahunter Vágslemmar (6.5$m^2$; 2.250kg). 60/120 m breitlar. Starmon-Oddi temperatur- og dýbdarmátari festur á høvðuslínuni.

## Viðmerkingar

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

## Fólk við frá Havstovuni

Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari)
Gunn Hansen og Jens Arni Thomassen.

*Talva 1. Veiða, nytrur, magar, kruvd vekt, gonaduvekt, livurvekt og tal av støðum pr. fiskaslag.*

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Kruvd | Gonada | Livur | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 7084.461 | 240 | 61 | 58 | 59 | 60 | 10 |
| TRANTKONGAFISKUR | 498.481 | | | | | | 10 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 208.588 | | | | | | 7 |
| SVARTKJAFTUR | 112.349 | | | | | | 10 |
| TINDASKØTA | 95.128 | | | | | | 9 |
| TOSKUR | 80.245 | 6 | 6 | 4 | 4 | 4 | 4 |
| BROSMA | 75.940 | 33 | 5 | 7 | 4 | 4 | 10 |
| HALAHVASSA SKØTA | 66.610 | | 1 | | | | 5 |
| BLÁLONGA | 48.085 | 13 | 9 | 2 | 7 | 7 | 4 |
| BLÁGÓMUR | 41.705 | | | | | | 3 |
| HVÍTASKØTA | 40.195 | | | | | | 4 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 33.751 | | | | | | 3 |
| KLINGRUSKØTA | 29.502 | | | | | | 8 |
| LIRI | 18.240 | | | | | | 3 |
| GULLLAKSUR | 11.480 | | | | | | 3 |
| HVASSASPREK | 8.637 | | | | | | 6 |
| LÁLLA | 7.591 | | | | | | 5 |
| HVALSPÝGGJ | 3.823 | | | | | | 3 |
| ÚLVFISKUR | 2.967 | | | | | | 2 |
| UPSI | 1.495 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| RÍSNA LANGASPORL | 1.480 | | | | | | 1 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 1.095 | | | | | | 3 |
| SILD | 0.598 | | | | | | 2 |
| LAKSATOBIS | 0.075 | | | | | | 1 |
| YMIST(ostur, skrambul v.m) | 25.360 | | | | | | |
| TILSAMANS | 8497.88 | 293 | 83 | 72 | 75 | 76 | |